Jutta S. Linklett og Hennie Joensen, sum báar ganga í 10 fl. í Fuglafjar›ar skúla, eru bá›ar betri nøgdar vi› starvsvenjingina í ár, í mun til sí›sta ár

Starvsvenjing á hægri stø›i

Nógvir næmingar fáa ov líti› burturúr í starvsvenjingini, og tí hevur Fuglafjar›ar Skúli skipa› fyri, at næmingarnir sjálvir bókføra teirra royndir, tá teir eru í starvsvenjing

STARVSVENJING
Sunneva Háberg Eysturstein

Tá næmingar koma í framhaldsdeildina, fáa teir møguleikan at uppliva mangt, sum gevur teimum varhugan av framtí›ini, i› liggur fyri føtur teirra. Millum anna›, er starvsvenjingin, i› er sera t‡dningarmikil, av tí stóru ávirkan ein hevur á alt, sum tannáringur. Tíverri ver›ur hetta evni› ikki altí› tiki› fyri álvara, men bert sætt sum naka›, i› ger óná›ir á arbei›søkjum. Ofta er komi› fyri, at arbei›splássi›› bert geva næmingunum ta› ke›iligasta arbei›i, sum at vaska vindeygu, dustsúgva, og anna› tílíkt. Næmingar eru ikki beinlei›is ónøgdir, men alt ov ofta eru næmingar, i› hava fingi› ov líti› burturúr, hesar tvær vikurnar, í starvsvenjingini.

Ta› er kanska ikki so lætt, at ein ungur óroyndur næmingur kemur solei›is brestandi inn á eitt arbei›spláss. Men um teir í sta›in fyri sum mangan at ver›a sleptir upp á fjall fingu møguleikar at víst hvat teir dugdu til, so kundi veri› ø›rvísi.

Dagfinnur Danbjørg, kom vi› hesi vi›merking:

– Her á Fuglafjar›ar Skúla, hava vit skipa› fyri einum tiltaki, i› kanska fer at ávirka starvsvenjingina. Vit eru ikki tey fyrstu i› hava syrgt fyri hesum, tí á Toftum og í Runavík, er naka› líknandi fari› fram. Vit hava gjørt ein bókling, i› vónandi kann hjálpa næmingunum, og møguliga eisini fer at geva teimum eitt eydnuríkt upplivilsi, í mun til ta›, i› á›ur hevur veri›. Bóklingurin inniheldur nakrar spurningar, i› næmingarnir skulu svara uppá á›renn starvsvenjingina, sí›ani skulu teir vi›gera ta› íme›an teir eru í starvsvenjing, t.v.s. samla vitan um arbei›søki, og aftaná skulu teir aftur vi›gera ta›, i› gekk fyri seg á arbei›søkinum.

– Hetta fer helst ikki at ávirka skúlar um alt landi›, beinanvegin, men vónandi um eitt ár ella tvey, fer hetta at vera eitt almennt tiltak. Ta› einasta i› er gali› nú, er at tá i› landi› vi›tók, at næmingar á øllum skúlum kundu fara í starvsvenjing, syrgdi man ikki fyri at allir almennir stovnar fóru at taka ímóti næmingunum. Í øllum førum, skuldu man syrgt fyri, at teir stóru stovnarnir fóru at taka ímóti næmingunum. Enn og betur hev›i veri›, um allir stovnar høvdu gjørt eina skipan, har ein hev›i haft eina ásko›an yvir hvat ein skal gera hvønn dag. Vit kunnu bert vóna at hetta fer at ver›a tiki› vi› álvara. Ein stór hjálp, i› longu er skipa› fyri, er at lærarnir koma og vitja næmingarnir, tá starvsvenjingartí›in fer fram.

Tvær gentur, Jutta S. Linklett og Hennie Joensen, úr10. fl. í Fuglafjar›ar Skúla, søgdu, at starvsvenjingin í ár, hevur veri› meira áhugaverd enn sí›st. Tær eru á Tórshavnar Sjómansheimi›, og ein av teimum hevur enntá ein framtí›ardreym, at gerast flogterna, so hetta vi› at arbei›a á matstovu, er ein sonn roynd fyri hana. Hin, hevur harafturímóti ikki áhuga í at arbei›a á hotelli, men sigur, at hetta er naka› heilt anna› enn hon hev›i vænta›.

– Arbei›i› lærir ein nógv. M.a. at ver›a framligur, og hyggja inn í eyguni á fólki, ísta›in fyri at standa og glø›a ni›ur í gólvi og smæ›ast. Ta› kemur kanska av tí, at um vit gera okkurt skeivt, so skelda tey okkum ikki, men áminna okkum vinarliga, hvat feilurin er.

– Vit royna ta› vit kunnu, at vera vi› í øllum, og ta› gera arbei›sfólkini eisini. í grundini er eingin munur á okkum og teimum. Tey loyva okkum at royna alt. Um okkurt er, i› vit kanska ikki duga, sum t.d. at svara vi›skiftafólkinum spurningar, hjálpa tey okkum beinanvegin. Vit skiftast um at vera í móttøkuni, matstovuni, og at vera á gongini. Ta› er stuttligt, men ta› kemur eisini ann uppa hvat vit ver›a settar at gera. Tó, er hetta ikki naka›, eg hev›i kunna› hugsa› mær at arbeitt vi› alt lívi›, sigur Jutta.

Hennie, harafturímóti, hevur a›rar ætlanir:

– Vit vænta›u ikki so nógv, tá fingu at vita, at ta› var her vit skuldu. Tey tóku sera væl ímóti okkum, og vit kendu okkum als ikki fremmandar. Vit hava roynt alt i› er at royna, og eru sera væl nøgdar, eisini av tí, at arbei›sfólkini eru so blí› og opin. Henda roynd, hevur gjørt, at eg væl hev›i kunna› hugsa› mær at arbeitt vi› onkrum líknandi hesum, seinni. Kanska okkurt i› er eitt sindur ø›rvísi, sum flogterna.

– Bóklingurin frá skúlanum, hevur gjørt ein mun fyri okkum. Kanska ikki ein so ótrúliga stóran mun enn, men eg eri í øllum førum væl nøgd, afturímóti sí›st. Tá var› eg sett at vaska og sovorit har. Har var tó ikki ov nógv at gera, men tey høvdu fegin kunna› givi› mær okkurt anna› frægari at gjørt.

Tær eru bá›ar, sum sagt, væl nøgdar, og vóna at starvsvenjingin fer at vera tikin vi› álvara í framtí›ini. Hóast flestu fyristø›ufólkini, eru ógvuliga áhugaverd í at fáa næmingar í starvsvenjing, er møguligt at gera meiri burturúr!

Jazzur á markna›inum

Sunneva Háberg Eysturstein

Í dag gevur plátufelagi› TUTL út fløguna Debazz, av Edvard Nyholm Debess. Alt ov sjálvdan eru føroyskar jazzfløgur at síggja á markna›inum, so ta› kemur væl vi›, at Debazz, ein sonn jazzfløga, nú, er givin út.

Tónleikurin er fri›arligur jazzur, vi› óvænta›um, men væl skipa›um íblástrum, og solo-spæli. Sera gó›ur jazzur, og væl ogna›ur til “bakgrundstónleik”.

Edvard Nyholm Debess, hev›i saman vi› TUTL, í samband vi› fløguna, tí›indafund í morgun, har tónleikur hansara var› spældur, fyri at vísa fólki á, hvat fløgan er gjørd av. Umbo› fyri plátufelagi› TUTL var tilsta›ar, og kaffimunnur var eisini eisini at fáa.

Edvard hevur sjálvur skriva› flestu løgini, og hevur hann eisini skipa› fyri flestu tiltøkum, í samband vi› fløguna. Vi› honum, hevur Karsten Vogel framleitt fløguna.

Kendu jazztónleikararnir, Karsten Vogel, Jacob Christoffersen og Ole Theill, spæla vi› Edvardi í bólkinum, og saman, hava teir spælt fløguna inn, í kendum studio, kalla› Focus Recording, í Keypmannahavn.

Hugurin drívur verki›

Forlagi› Fannir hevur givi› fimm bøkur út í ár, og f‡ra teirra komu á gøtuna mikudagin. Ta› eru hjúnini Marianna Debes Dahl og Árni Dahl, sum standa fyri forlagnum. Fannir hevur veri› virki› í fleiri enn tjúgu ár, og forlagi› nærkast nú hundra› útgávum. Hugurin drívur verki›

BÓKAÚTGÁVUR
Stefan í Skorini



Myndatekstur: Turi› Sigur›ardóttir(vm), Marianna Debes Dahl, Steinbjørn B. Jacobsen og Árni Dahl (sitandi). Hesi hava manna› li›i› hjá Fannum í hesum umfarinum Mynd: Jens Kr. Vang

Forlagi› Fannir ger eitt stórt arbei›i fyri føroyskar bókaútgávur og hevur harvi› ríka› føroysku tjó›ina vi› alskyns skaldskapi. Ta› liggur nógv arbei›i aftanfyri hvørja útgávu, men Árni og Marianna gera ta› av berum áhuga.

– Eg hev›i sjálvandi ikki gjørt hetta, um eg ikki helt, at ta› var stuttligt at fáast vi› ta›, og eg haldi, at ta› er ógvuliga stuttligt at fáast vi› bókaútgávur, sigur Árni Dahl.

Idealisma

Ta› er naka› idealistiskt vi› arbei›num hjá Marionnu og Árna, tí tey hava hildi› á í so nógv ár, hóast tann peningaligi vinningurin er ógvuliga avmarka›ur, og fleiri bøkur geva beinlei›is undirskot.

– Eg haldi, at ta› er ein partur av tjó›arbyggingini at geva bøkur út. Eg vil vera vi› til at lívga um á hesum økinum, so at n‡ggjur skaldskapur ver›ur givin út allatí›ina.



Í sínum dagliga arbei›i fæst Árni nógv vi› føroyskar bøkur. Hann er lærari fyrst og fremst í føroyskum og hevur arbeitt bæ›i í fólkaskúlanum og á Læraraskúlanum.

Tali› av bókaútgávum í Føroyum er vaksi› mundandi seinastu árini, og ta› gle›ir Árna. Ta› er ikki minst teirra arbei›i fyri at takka, at útgávurnar eru so nógvar í tali.

– Ein má hava í huga, at tá eg var barn, komu bara eini 10-20 bøkur út á føroyskum um ári›. Nú koma eini 150 um ári›, so ta› er ein stór framgongd sí›an ta›.

Ætla›u at gevast

Ta› kann mangan vera tungt at fáast vi› bókaútgávur í Føroyum, tí fólkagrundarlagi› er so avmarka›. Hetta hevur onkuntí› fingi› forlagi› ni›ur í knøini.

– Vit hava havt ætlanir um at gevast fleiri fer›ir, men vit stu›la hvørjum ø›rum. Tá eg havi havt hug at lagt hetta arbei›i› frá mær, hevur hon roynt at hildi› á, og tá hon hevur givi› skarvin yvir, havi eg eggja› henni til at hildi› á.

– Tá havt ver›ur í huga, at vit hava eitt høvu›sarbei›i og hetta sum hjáarbei›i, so kann ta› mangan vera tungt, tí vit brúka nógvar tímar av okkara frítí› uppá hetta. Men hinvegin høvdu vit ikki fari› undir hetta uttan so, at vit dámdu ta› avbera væl.

Fannir hevur ofta veri› djarvt og givi› ungum rithøvundum møguleikan at fáa sítt tilfar útgivi›, men í ár hevur einki veri› at sæ› til ungar rithøvundar á Fannum.

– Ta› er rætt, at vit hava givi› nógv n‡tt út, men fleiri av teimum ungu, sum góvu út, vóru naka› skjót at koma vi› næsta savninum. Ta› er ein av orsøkunum til, at onkur teirra er farin yvir á eitt anna› forlag at geva út.

– Annars eru vit ikki givin vi› at geva bøkur og søvn hjá ungum rithøvundum út. Vit fáa javnan handrit, og vit meta um tey. Um tey ikki eru nóg gó›, so fær vi›komandi ta› aftur í høvdi›.

– Útgávurnar avmarka seg sjálvar, tí tá tú fert undir eina útgávu av einum yrkingasavni til dømis, so veist tú frammanundan, at ta› gevur undirskot á eini 15.000 krónur.

Jólagávan
til hansara
fæst hjá okkum

Wolfcraft
Master 200
arbeiðsborð
785,-
Støkk inn á gólvið og síggj
okkara stóra úrval
PF. VALDEMAR LÜTZEN
Skálatrøð 14 - Postboks 20 • 110 Tórshavn • Tel. 31 16 75
Sosialurin - 311820